gult24 cyan24 magenta24 svart24



**Hetta kundi so øgiliga lætt verið tann sama, slitna søgan um aftur ein bólk, sum fyri 25 árum síðani taldist millum teir stóru - og sum síðani hevur livað av at vera eitt veikt ekkó av sær sjálvum. Aerosmith er eitt lívsjáttandi undantak. Her er søgan um fimm amerikanarar, sum eftir tann heilt stóra niðurtúrin snimma í 80'unum reistust úr narko-øskuni og higartil hava selt yvir 100 milliónir plátur**

# Aerosmith - gamlir menn vísa veg

*Niclas Johannesen*

Mánadagur 19. mars var dagurin, tá amerikanski bólkurin Aerosmith varð heiðraður í Rock and Roll Hall of Fame í New York. Ein heiður, men eisini ofta eitt heðraklapp til bólkar, ið hava sínar bestu dagar aftan fyri seg.

Aerosmith eru eitt undantak. Júst í hesum døgum drønar vælsmurda rocklagið 'Jaded' áhaldandi á tónleikarásunum í Norðuramerika. Bólkurin ljóðar frískur sum fyrsta dagin við nýggja singlelagnum, ætlað sum agn til komandi útgávuna Just Push Play - tann fyrsta útgávan nakrantíð, sum limirnir í Aerosmith sjálvir hava produserað.



Enska blaðið 'Q' himprast heldur ikki at kalla Aerosmith fyri amerikansku rock-kongarnar.

"Teir skuldu, sjálvsagt, verið deyðir upp til fleiri ferðir. Men onkursvegna hevur Aerosmith vunnið á heroin, sjálvhatri og einum lívi í ótálmaðum marglæti", staðfestir 'Q'.

## Tung byrjan

Søgan um Aerosmith byrjar í 1970, tá bassleikarin Tom Hamilton og guitarleikarin Joe Perry úr ókenda bólkinum Jam Band sláa saman við sangaranum Steven Tylor. Í kjalarvørrinum fylgja trummuspælarin Joey Kramer og guitarleikarin Brad Whitford og ein bólkur, sum fer at skriva seg dyggiliga í rocksøguna er føddur. Listarliga drekkur bólkurin úr sama brunni sum Led Zeppelin, har serliga guitarleikarin Joe



Perry hevur Jimmy Page sum fyrimynd - og tað ikki bara hoyrst, men sæðst eisini. The Beatles og Rolling Stones eru eisini millum favorittarnar hjá teimum fimm amerikanarunum - alt enskir bólkar - og Steven Tylor hevur síðani viðgingið, at tey fyrstu tíggju árini av yrkisleiðini royndi hann at vera sum Mick Jagger.

Bólkurin flytir til Boston og gerst skjótt vælumtóktur har um leiðir og í 1972 fær bólkurin loksins ein plátusáttmála við Columbia Records. Legendariski A&R maðurin Clive Davies stendur aftan fyri sáttmálan.

Hóast hetta gjøgnumbrotið, so vóru ikki allar hurðar opnar kortini. Teirra fyrsta pláta - bert kallað Aerosmith - floppaði. Heimurin hevði enn ikki fingið eyguni upp fyri amerikanska rockbólkinum. Aerosmith gjørdu eina plátu aftrat í 1973, Get Your Wings, men henda seldi heldur ikki tað stóra.

## Brak og misnýtsla

Tað var ikki fyrr enn við útgávuni Toys in the Attic, at sølan byrjaði at taka dyk á seg. Kritikarar meta hetta sum tað fyrstu veruliga dyggu útgávuna við Aerosmith. Serliga lagið 'Walk This Way' stendur í dag sum ein varði (meira um tað seinni).

Vit eru í 1975 og longu árið eftir kemur Rocks út. Plátan selur tríggjar milliónir eintøk í USA og røkkur einum triðja plássi a hittlistanum. Hetta er eisini útgávan, sum upprunaligi guitarleikarin í Guns N' Roses Slash seinni segði vera 'plátuna, sum broytti mítt lív'.

Men alt er ikki bara gaman. 1977: Draw the Line er fimta útgávan og selur eisini í milliónatali. Hetta er kortini eisini plátan, sum ongin teirra sigur seg minnast at hava gjørt - so langt úti vóru teir í evnismisnýtslu.

Steven Tylor og Joe Perry høvdu tað heldur ikki ov gott við hvønn annan.

Fyrstu tekini um kreppu sóust, tá guitarleikarin Joe Perry fór úr bólkinum og gjørdi sín egna bólk. Í dag viðganga báðir, at teirra samstarv er sum eitt gamalt hjúnalag. Perry sigur, at okkurt er millum teir, sum ger tað hugaligt at skriva løg. "Steve er sum ein hundur. Um eg spæli ávísar tónar, so byrjar hann at ýla. Og so veit eg, vit eru á rættari kós."

Meginparturin av 80'unum gjørdist eisini soltin hjá bólkinum. Sølutølini fóru niður og Aerosmith bleiv yvirhálað av glam-rock-bólkum so sum Mötley Crüe og Quit Riot. Plátan Done With Mirrors - produserað av Ted Templeman - var eitt flopp, og bólkurin rakk botninum.

## Ringir gamlir dagar

Spyrt tú limirnar í Aerosmith um hesa tíðina síðst í 70'unum og frammeftir, so er tað almenn vitan, at teir kallað hana "the bad old days". Dagarnir, tá eitt nú tey, sum vildu hanga í velinum á guitarleikaranum Joe Perry, fingu loyvi til tess, um tey 'rindaðu' við fýra grammum av kokain. Allir limirnir í bólkinum vóru so langt úti í rúsevnismisnýtslu, at fólk, ið arbeiddu fyri teir fingu at vita, at um ein av limunum hevði ikki verið at sæð í meira enn 24 tímar, so skuldu tey bróta hurðina inn til teirra kamar. Bara fyri at tryggja sær, at teir framvegis vóru á lívi.

"Eg minnist meg hugsa, tá eg hevði eina millión dollarar á bankabókini: 'tað fer aldrin at henda, at eg missi mínar pengar.' Og veist tú hvat? Tað hendi" hevur Steven Tyler sagt. 70'ini vóru eitt langt ball. Bólkurin spældi fyrr útseldum leikvøllum - við 80.0000 rindandi áhoyrarum. Men narkomistnýtslan vant upp á seg og niðurtúrurin byrjaði.

## Avrúsing og endurføðing

Merkisvert var tað, at tá bólkurin var longst niðri valdu teir allir at fara til avrúsingar. Um hetta mundið vistu teir lítið, at tað skuldi gerast ein rappbólkur, ið fekk teirra karrieru aftur á flot.

Ein dagin í 1985 fær managarin hjá Aerosmith Tim Collins eitt telefonkall frá grundleggjaranum av Def Jam Records. Plátufelagið er í fer við at gera plátu við rappbólkinum Run DMC og Rubin produserar sjálvur plátuna. Rubin fortelur Collins, at Run DMC í áravís hava rappað til 'Walk This Way', og Rubin, sum var ein Aerosmith 'fan' ætlaði at spyrja, um tað var í lagi, at rappararnir sluppu at brúka hetta lagið.

Tað var ikki eldhugur, ið fekk Aerosmith at játta eitt samarbeiði, men meira ein trongd eftir at fáa áttatúsund dollarar, sum eisini bleiv lovað teimum. Trummuspælarin Joey Kramer hevur síðani sagt: "Tað einasta eg visti um rapp var, at eg hataði tað."

Men tað ótrúliga hendi. 'Walk This Way' gjørdist eitt heimsumfatandi hittlag. Og nú lá eisini Evropa víðopið fyri amerikanska bólkinum. Limirnir siga, at um tað mundið dugdu teir ikki at virðismeta týdningin av, at 'Walk This Way' gjørdist ein 'rapp-klassikari', men í dag duga teir at síggja, at hetta var ein av orsøkunum til, at teir aftur fingu vind í seglini.

Onnur ting gjørdu seg eisini galdandi. Mest týðandi var tað, at teir nú allir vóru edrúir. Fløgan Permanent Vacation, sum kom út í 1987 boðaði ikki bara frá, at bólkurin var aftur á fótum, men at nú royndu Aerosmith at gera tónleik, sum eisini riggaði til mainstream tónleikastøðirnar. Hetta var gjørt við at fara í samstarv við aðrar sangskrivarar. Hetta var eisini fyrsta útgávan, har kanadiski produsearin Bruce Fairbairn sat aftanfyri knøttarnar.

Aerosmith vóru aftur á rættari kós.

## Klassikarar

1989 skuldi gerast árið, har Aerosmith setti øll persónlig met. Orsøkin var útgávan Pump - í dag ein rock-klassikari av teimum heilt stóru. Við løgum sum 'Love In An Elevator', 'Jamie's Got A Gun' og 'The Other Side' lá heimurin víðopin.

Útgávan rakk eisini toppin á øllum heimsins tónatindum og á tónleikarundferðini, sum fylgdi í kjalarvørrinum, taldust fleiri enn ein milliard fólk millum teirra sum sóu ella hoyrdu Aerosmith. Bólkurin gerst ein risi á heimsins rockpalli. Eftirristingarnar frá brakinum røkka heilt inn í 1991, tá bólkurin vinnur ein Grammy fyri lagið 'Janie's Got a Gun'.

Tey, sum hildu, at nú kundi tað ikki gerast betur - ja, tey fóru skeiv. Næsta útgávan Get A Grip gjørdist eisini eitt drønandi brak. Hon lendið beinleiðis á nummar eitt á amerikanska Billboard hitt-listanum. Hetta var sjálvsagt eisini eitt prógv um, hvussu stórar vónir fólk høvdu til bólkin eftir Pump. Løg sum 'Livin' On The Edge', 'Cryin' og 'Amazing' fingu øll undirtøku frá radiostøðum, lurtarum og keyparum. Aerosmith spældi 225 konsertir kring allan heim og tá avtornaði hevði Get A Grip selt 12 milliónir eintøk.

At tann stóri, breiði lurtaraskarin nú tók Aerosmith til sín skuldi tó eisini vísa seg at gerast eitt tvíeggjað svørð, sum mundið gjørt av við bólkin. Aerosmith kendu seg onkursvegna bundnar av stóru sølutølunum, og í huginum hjá mongum bar næsta útgávan boð um, at bólkurin var um at selja sína sál. Nine Lives var øll sum hon var skrivað saman við kendum sangskrivarum so sum Diane Warren í strembanini eftir at verða verandi inni í radio-hitanum. Hetta eydnaðist eisini til fulnar við løgum so sum "Falling In Love (Is Hard On The Knees)", men í oyrunum hjá mongum ljóðaði henda útgávan meira stirvin og mekanisk enn undanfarnu stórseljararnir.



## Aftur í oddinum

Bólkurin mundi eisini farið í søguna um hetta mundið. Brúk var fyri einum steðgi. Hann gjørdist langur. Onki upprunatilfar hevur verið at hoyrt frá bólkinum í úti við fýra ár. Við nýggju útgávuni er hetta nú søga, og alt bendir á, at bólkurin er listarliga endurføddur á øðrum sinni.

Ein av høvuðsorsøkunum halda limirnir í bólkinum vera, at teir hava sjálvir produserað og skrivað løgini.

"Tá plátufelagið byrjaði at tosa um, hvørjar produsarar vit skuldu brúka til nýggju útgávuna, vendist alt í búkinum hjá mær", sigur Joe Perry við 'Q'. Plátufelagið var alt annað enn sannført um, at Aerosmith sjálvir kundu standa fyri produktiónini. "Men hetta gjørdi okkum bara upp aftur meira sannførdar", leggur Steven Tylor aftrat.

Endin var, at Joe Perry bygdi eitt studio heima hjá sær, har allir limirnir hittust at skriva og innspæla nýggju løgini. "Vit løgdu ikki frá okkum fyrr enn vit høvdu skrivað okkurt. Kenslan okkara millum var eisini, at vit vildu skriva heimsins bestu plátu", leggur Steven Tylor aftrat.

Onkur heldur kanska tað er ósmæðið, meðan onnur frøast yvir tankan um, at gamlir rockarar - Tylor er 53 ár og er tann elsti - framvegis hava slíka drívmegi. Ein kritikari fer so langt sum at siga, at stóra undurið er ikki, at allir limirnir yvirlivdu narkohelviti og framvegis eru saman, men at bólkurin hevur klárað at ligið frammi í oddinum øll hesi árini.

Hinvegin so dylur bassleikarin Tom Hamilton ikki fyri, at teir allir eru greiðir um, at Aerosmith eisini fer at fáa ein enda: "Vit hava gjørt hetta í so mong ár, at eg haldi, vit eru allir greiðir yvir, at hetta fyrr ella seinni fær ein enda. So við hesi plátuni hava vit veruliga kýtt okkum fyri at gera og levera tað besta, sum vit yvirhøvur kunnu."

Mangt bendir á, at fólkið tekur undir við bólkinum. Staklagið "Jaded" verður dúgliga spælt og Just Push Play kom beinleiðis inn á nummar 2 á amerikanska Billboard hitt-listanum.

Meðan komandi tíðin fer at vísa, hvussu hendan útgávan fer at hildnast, so er ikki ov nógv sagt, at Aerosmith eru kanska ikki bara tann størsti amerikanski rockbólkurin, men fyri vist eisini tann seinasti frá klassiska tíðarskeiðnum - sjeytiárunum.



# USA: Fjóðra hvørt svarta dreingjabarn endar í fongsli

**Onki annað land í heiminum setur so nógvar av sínum egnu íbúgvum í bolt og jarn sum USA. Serliga minnilutarnir ferðast uttan fyri lógarkarmarnar. Amerikanarar eru tvíbýttir í hesum spurningi - ikki minst tí at fanga-raksturin kostar statinum 200 milliardir krónur árliga**

*Niclas Johannesen*

Tað finst ein amerikanskur stórbýur, sum er ikki at síggja á nøkrum korti, sjálvt um tvær milliónir búgva har. Fleiri enn 90 prosent av íbúgvunum eru menn - helvtin teirra svartir. Í 80'unum vaks býurin líka skjótt í manntali, sum San Francisco. Allir íbúgvarnir eru fongsulsfangar, 1,2 millión sita inni fyri lógarbrot, har harðskapur ikki var uppií.

Onki annað land í heiminum sendir líka stóran prosentpart av fólkinum aftan fyri rimarnar sum USA. Ein út av hvørjum 137 amerikanarum situr í fongsli.

## Narko-bardagi

Tað hevur ikki altíð verið soleiðis. Í 1973 var ein út av 1042 amerikanarum í fongsli. Sama ár staðfesti NACCJSG (National Advisory Commission on Criminal Justice Standards and Goals), at "ongar nýggja institutiónir skulu byggjast til vaksin, og verandi støð fyri fólk undir 18 skulu niðurleggjast." Grundgevingin var, at "Fongsul hava onki at vísa á uttan eina skelkandi røð av kiksarum."

Men í 80'unum og 90'unum gjørdist fongslið eitt yndistól á politiska leikvøllinum. Orsøkin var ikki tann, at kriminaliteturin øktist - harðskapskriminalitetur var at kalla tann sami gjøgnum øll 80'ini, inntil hann fall rættiliga nógv í 1993.

Heldur var tað ein tráan eftir at revsa, sum fekk gróðrarfesti. At 'revsa hart' og skjótt hevur verið politiskt korrekt í USA síðani byrjanina av 80'unum, tá táverandi forsetin Ronald Reagan hevjaði 'stríðsflaggið' móti tí, ið síðani er kent sum "the War on Drugs" - bardagin móti narkotika.

## Svartir menn

Fyrsta stigið var at víðkað brotsverk-hugtakið. Gerningar, sum áður vórðu mettir at vera smærri misgerðir gjørdust nú størri brotsgerðir - eitt nú var tað at hava hash uppi á sær og at selja hash í smærri nøgdum mett at vera eitt brotsverk móti amerikanska statinum. Løgreglan fekk størri frælsi at handtaka fólk, loyvi til at lurta loyniligt eftir telefonum, léttari við at gera húsarannsóknir og víðkaða atgongd til persónligar upplýsingar hjá fólki.

Í 1970 vóru fyrstu lógirnar settar í verk, sum góvu myndugleikunum fíggjarligan stimbur at fremja fleiri handtøkur - eitt nú við, at løgreglan í ávísum førum kundi selja vørur, sum hald var lagt á, til tess at fíggja teirra egna fyritakssemi. Talið á fólki, ið arbeiddu innan rættarskipanina reyk í loft. Amerikanska kongressin viðtók ein langan lista við lógum, ið staðfestu rúgvu av treytaleysum dómum og legði lunnar undir ein hóp av langtíðar fongsulsrevsingum. Úrslitið er, at í dag sita fýra ferðir fleiri amerikanarar handan rimarnar enn í 1980.

USA brúkar í dag fleiri pengar upp á fongsul enn upp á menningarhjálp, umhvørvisverndar umboðsstovuna og amerikanska skúlabókmentagrunnin tilsamans.

Hagtølini vísa, at fyri hvørjar fýra svartar menn, sum hava valrætt, hevur ein teirra ikki loyvi at velja - antin tí hann situr í fongsli ella er revsaður áður. Fongslini verða sum oftast bygd úti á landinum, samstundis sum tey fyri tað mesta hýsa býarfólkum. Næstan helvtin av íbúgvunum í lítla býnum Coxsackie - sum liggur í statinum New York - eru fangar, flestu teirra frá New York City - í hagtølunum sæst hetta aftur sum ein 'fólkaflyting'.

## Stórídnaður

Revsing er í dag ein stórídnaður. Tað byrjaði, tá fyritøkan U.S. Corrections Corp. í 1984 vann útbjóðingina at reka eitt fongsul í Kentucky. Ein ídnaður var føddur. Í 80'unum var privatisering eitt lyklaorð við miklari kraft og í samsvar við henda tíðaranda varð staðfest, at fyritøkur kundu reka fongsul nógv meira effektivt enn staturin. Í dag hava 31 statir avreitt fittan part av teirra fongsulsumsiting til privatar fyritøkur. Umleið seks prosent av fangunum í USA sita í dag í privatum fongslum. Hesi privatu fongslini umsita fyri umleið 8 milliardir krónur í inntøkum árliga.

Líka sum ein alistøð skapar sítt egna fóður, soleiðis er talið av fangum nú nóg stórt til at framleiða sín egna vókstur. Meira enn ein triðingur av teimum, sum vera send í fongsul eru fólk, sum eru royndarleyslatin, men sum eru 'dottin útí aftur'.

Ein leiðari, ið arbeiðir við rættarhagtølum, Allen Beck, sigur tað soleiðis við blaðið Rolling Stone: "Alt gongur í ringrás. Jú fleiri tú sendur handan rimarnar, tess fleiri verða royndarleyslatin, tess fleiri eru í vanda fyri at kiksa, tess fleiri kiksa, og soleiðis enda fleiri og fleiri aftur í fongsli."

## Ymsar tulkingar

Ymsu partarnir lesa stóra talið av fongslaðum amerikanarum á ymsar hættir. Tey konservativu vísa á, at harðaru og longri straffarnir hava gjørt, at vandamikil fólk nú sita handan rimar og at hetta júst er orsøkin til, at kriminaliteturin er lækkaður. "Hóast longri revsing helst er viðvirkandi til, at fleiri sita í fongsli í dag, so hevur hetta eisini verið við til at gjørt, at harðskaps-kriminalitetur er lækkandi," sigur republikanski senatorurin Strom Thurmond við blaðið Rolling Stone.

Hin vongurin - tey liberalu - geva hevnisøku, sensationalistisku fjølmiðlunum og beinleiðis rasismu skylduna fyri, at so mong í dag sita í fongsli í USA. Hvussu ber tað til, at fleiri fólk frá minnilutum enda í fongsli samstundis sum kriminaliteturin er minkandi, spyrja tey.

"Orsøkin til at vit loyva at vera so revsandi er, at byrðan fellur ikki á tann ráðandi meirilutan men á ein maktarleysan minniluta", sigur professarin David Cole í blaðnum Legal Times. "Hugsa tær, hvussu amerikanski rættarpolitikkurin hevði sæð út, um eitt út av fýra hvítum børnum skulu rokna við at vera dømd til eitt ár ella meira í fongsli," leggur hann aftrat.

Orðaskifti gerst alsamt heitari, tí árliga kostar tað amerikanska statinum útivið 200 milliardir krónur at húsa hesum mongu fangunum - har av 1,2 millión eru send í fongsul fyri 'smærri' brotsgerðir.

Júst henda risaútreiðsla og alsamt økjandi talið av fongslaðum gevur ábendingar um, at almenningurin fyrr ella seinni fer at avgera, at tað loysir seg ikki at senda so mangar av landsins íbúgvum í fongsul

*Kelda: Rolling Stone, internet*

## FAKTA

Minnilutar vera sendir í fongsul upp til trettan ferðir oftari enn tey hvítu. Orsøkin er, at løgreglan serliga heldur eyguni við láginntøkubýlingum. Eisini eru revsingarnar til fyrimuns fyri yvirklassan. Dømi: Selur tú fimm gramm av bíliga narkoevninum kallað 'crack' so fært tú fimm ára fongsul mótvegis nógv linari revsing, um tú selur fimm gramm av 'yvirklassa' narkoevninum kokain. Sambært felagsskapin 'Human Rights Watch' so vísir tað seg, at hóast hagtølini vísa, at hvít brúka meira narkotika enn tey svørtu, so eru millum 80-90 prosent av narkológbrótarum svørt.

gult25 cyan25 magenta25 svart25